?

Hvussu langa tíð tekur tað einum tyggigummi at hvørva úr náttúruni?

1. 3 vikur
2. 1 ár
3. **5 ár**

Svarar tú rætt,
kanst tú flyta 2 fet fram.

Hvussu langa tíð tekur tað einum bananskali at hvørva úr náttúruni?

1. 3 dagar
2. **2-5 vikur**
3. 1 ár

Svarar tú rætt,
kanst tú flyta 3 fet fram.

Hvussu langa tíð tekur tað einum hundalorti at hvørva úr náttúruni?

1. 1 dag
2. **<u>2 vikur</u>**
3. 5 ár

Svarar tú rætt,
kanst tú flyta 2 fet fram.

Hvussu langa tíð tekur tað eini plastfløsku at hvørva úr náttúruni?

1. 10 ár
2. 100 ár
3. **500 ár**

Svarar tú rætt,
kanst tú flyta 2 fet fram.

Hvussu langa tíð tekur tað eini glasfløsku at hvørva úr náttúruni?

1. 10 ár
2. 100 ár
3. **<u>1 millión ár</u>**

Svarar tú rætt,
kanst tú flyta 3 fet fram.

Hvussu langa tíð tekur tað einum íspinni at hvørva úr náttúruni?

1. 1 ár
2. **10 ár**
3. 50 ár

Svarar tú rætt,
kanst tú flyta 2 fet fram.

Klárar tú at standa á einum beini,
meðan tú nevnir okkurt, sum
kann latast í hvíta posa, sleppur
tú at flyta 2 fet fram. Um tú ikki
svarar rætt, skalt tú flyta 2 aftur.

**Svar:** Pappír og papp
(bløð, avísir, brævbjálvar, eskjur o.s.fr.)

Tú ert gliðin í einum
bananskali og mást
bíða eitt umfar.

Tú hevur traðkað í ein
hundalort og mást tí
flyta 2 fet aftur.

Vel ein, ið dugir at stava:

**SKILJA RUSK**

Er tað rætt stavað, kanst tú flyta 3 fet fram.

Tú hevur fingið rusk
í eygað og mást tí
ringla einaferð afturat.

Hvønn posa skal pappír og papp í:

1. Gráa posan
2. **Hvíta posan**
3. Reyða posan

Svarar tú rætt, kanst tú flyta 2 fet fram.

Tað er stuttligt at gera rím.
Ger rím við hesum orðum:

**Brenna** **Rusk** **Skilja**

Dugir tú at ríma,
kanst tú flyta 2 fet fram.
Um ikki, skalt tú flyta 2 fet aftur.

Hvussu eitur felagið, sum heintar ruskposar á flestu støðum í Føroyum?

1. <u>**IRF**</u>
2. SMS
3. TAKS

Svarar tú rætt, kanst tú flyta 3 fet fram.
Um ikki, skalt tú flyta 2 fet aftur.

Tú hevur verið røsk/raskur
at samla rusk og kanst tí
ringla einaferð afturat.

Øll, sum spæla við, skulu nevna
1 ting, ið er skilagott at endurnýta, tvs.
brúka umaftur, heldur enn at tveita burtur.

Klára tit tað, kunnu øll flyta 2 fet fram.
Um onkur ikki klárar tað, flyta øll 1 fet aftur.

**Svar:** T.d. papp av vesirullu kann brúkast til
at gera ymisk prýði, glaskrukkur kunnu brúkast
til goymsluílat og klæðir kunnu latast víðari
til onnur at brúka o.s.fr.

Ruskinnsavnarar eru so
glaðir í dag, tí nógvir hvítir posar
við pappíri og pappi eru komnir
í bilin. Teir hava hug at gera okkurt gott
fyri onkran og velja at geva spælaranum,
ið er aftastur í spælinum, terningin,
so hann kann ringla eina ferð afturat.

Tú hevur skorið teg
av eini brotnari fløsku
og mást á skaðastovuna.
Flyt 2 fet aftur.

Áááá á nei, tú hevur
blakað ein íspinn á vegin.
Tú mást bíða eitt umfar,
meðan tú tekur hann upp aftur.

Tú skalt yvir um vegin, men mást bíða,
tí fleiri ruskbilar koyra eftir vegnum.
Fyrst sært tú 2 ruskbilar, so 4 afturat, og tá
tú kemur yvir um vegin, sært tú 1 afturat.
Hvussu nógvar ruskbilar hevur tú so sæð í alt?

Telur tú rætt, kanst tú flyta 3 fet fram.
Um ikki, skalt tú flyta 2 fet aftur.

**Svar: 7 bilar.**

Vel ein spælara, ið dugir at nevna teir 3 litirnir á posunum, sum IRF vil hava teg at skilja ruskið í. Klárar spælarin tað, sleppa tú og tann spælarin at flyta 2 fet fram.

**Svar:** Grái posi, hvíti posi og reyði posi.

Tú hevur traðkað á eitt tyggigummi
og stendur føst/fastur.
Bíða eitt umfar.

Tú hevur brúk fyri meira orku fyri
at skilja meira rusk. Vel ein av spælarunum
at hoppa 5 einglahopp saman við tær.
Klára tit tað, kunnu tit flyta 3 fet fram.
Um ikki, skulu tit flyta 2 fet aftur.

Tú tekur pappírið av einum slikkipinni, men finnur einki ruskílat. Hvat er tað besta at gera:

1. Blaka pappírið undir ein bil
2. **Leggja pappírið í lumman til tú finnur eitt ruskílat**
3. Eta pappírið

Svarar tú rætt, kanst tú flyta 2 fet fram.

Hvat gert tú við gomul battaríir?

1. Leggur tey í skuffuna og samlar tey saman seinni, tá skuffan er full
2. **<u>Goymir tey í krukku við loki á og leggur krukkuna í reyða posa, tá hon full</u>**
3. Letur tey í ruskposan saman við tí vanliga húsarhaldsruskinum

Svarar tú rætt, kanst tú flyta 2 fet fram.

Elektronikkur, so sum telefonir og teldlar innihalda nógvar virðismiklar rávørur, sum verða endurvunnar. Hvønn posa skulu vit lata gamlar telefonir og teldlar í?

1. Gráa posa
2. **Reyða posa**
3. Hvíta posa

Svarar tú rætt, kanst tú flyta 2 fet fram.

Hvussu nógvar ruskposar við húsarhaldsruski heintar IRF hvørja viku?

1. 1.000
2. **<u>10.000</u>**
3. 15.000

Svarar tú rætt,
kanst tú flyta 2 fet fram.

Hví skulu vit skilja rusk?

1. **<u>So kunnu vit senda ein part til endurvinning, og tað er gott fyri umhvørvið, tí færri nýggjar vørur verða framleiddar og minni útlát av CO2</u>**
2. So keða vit okkum ikki
3. So kunnu ruskinnsavnarar hava meira at gera

Svarar tú rætt, kanst tú flyta 3 fet fram.

Tú hevur biðið tey vaksnu pakka
brotið glas væl inn, soleiðis at ruskmenninir
ikki skera seg av tí. Tað er sera skilagott,
og tú kanst tí flyta 4 fet fram.

Tað riggar ikki at skola niður á vesinum, tí rottangin er fullur. Rottangabilurin hjá IRF kemur at tøma rottangan, so tit aftur fáa brúkt vesið. Tað eru bara 3 ting, sum eiga at vera skolað niður í vesið. Hvørji?

1. **Piss, kukk og vesipappír**
2. Vesipappír, hár og vattpinnar
3. Einnýtislappar, vesipappír og tanntráður

Svarar tú rætt, kanst tú flyta 2 fet fram.

Í dag er kavi, og vegurin til ruskstativið
er ikki grivin og saltaður.
Bíða eitt umfar.

Tú ætlaði at lata ljósperur í reyða posa,
men hevur ongan eftir. Tú bíleggur
ein posa á www.irf.fo og mást
bíða eitt umfar.

Hvussu ofta kann pappír og papp endurvinnast til nýggjar vørur?

1. 1-2 ferðir
2. 3-4 ferðir
3. **<u>7-10 ferðir</u>**

Svarar tú rætt,
kanst tú flyta 3 fet fram.